TÓRSHAVNAR KOMMUNA

**Leiðreglur fyri bílegging og brúk av fótbóltsvøllum hjá Ítróttaanleggum í Tórshavnar kommunu**

**Innleiðing og endamál**

§ 1. Hesar leiðreglur skulu tryggja, at feløg, borgarar, fyrisiting, stovnar o.o. hava greiðar reglur fyri lán og brúk av fótbóltsvøllum og fótbóltsstadion hjá Ítróttaanleggum.

Stk. 2. Endamálið er at tryggja, at vøllir v.m. verða nýtt so munagott og skynsamt sum gjørligt og styðja upp undir eitt virkið ítrótta- og kappingarvirksemi í kommununi. Harumframt at stuðla og eggja til ein virknan lívsstíl við rørslu og felagsskapi og í aðru atløgu at veita karmar til tiltøk innan handil, mentan, frítíð o.a.

Stk. 3. Umframt hesar leiðreglur kunnu serstakar reglur ásetast fyri einstøk høli v.m., ið eru tøkar á heimasíðu hjá kommununi ella ásettar í avtalu.

**Allýsingar**

§ 2.

Fótbóltsvøllir: Ovari vøllur í Gundadali, Niðari vøllur í Gundadali, Eysturvøllur, Vøllurin í Vika, Hoyvíksvøllur og Tórsvøllur.

Fótbóltsfeløg: HB, B36, AB, FC Hoyvík, Undrið FF, sum í verandi støðu eru virkin innan kappingarfótbólt hjá FSF og sum hava heimstað í Tórshavnar kommunu, umframt Trón, ið er virkið innan heilsufótbólt.

**Almennar ásetingar um tillutan av vallartímum**

§ 3. Raðfesting í sambandi við tillutan av tímum tekur høvuðsstøði í hesum virksemi:

1. Feløg við kappingarvirksemi fyri børn og ung
2. Feløg við kappingarvirksemi fyri vaksin
3. Skúlar/frítíðarskúlar
4. Feløg við heilsuvirksemi
5. Eldraøkið

Fram til kl. 20 verður mest møguligt virksemi fyri børn og ung við venjara at raðfesta fram um virksemi uttan venjara ella fyri vaksin.

§ 4. Feløgini koma við uppskoti til Ítróttaanlegg um venjingartíðir fyrst í januar á hvørjum ári. Feløgini verða kallað á fund í januar á hvørjum ári, har Ítróttaanlegg og feløgini royna semju um býtið. Ítróttaanlegg kann royna at mekla og fáa semju.

Stk. 2. Um viðurskifti hjá feløgum og einstøkum liðum broytast og grundarlag er fyri betri nýtslu av tillutaðum tímum, skal felagið gera vart við tað hjá Ítróttaanleggum.

Stk. 3. Feløgini mugu tola, at landsliðsvirksemi og evropeiskt kappingarvirksemi kemur fram um annars ráðlagt virksemi við stuttum varningi.

§ 5. Tillutanin av tímum á vøllunum tekur støði í tali av íðkarum og liðum, umframt endamálinum og vavinum á virkseminum hjá feløgunum og øðrum brúkarum, umframt landafrøðiligt tilknýti.

Stk. 2. Í tann mun tað ikki eydnast heilt ella lutvíst, er tað Ítróttaanlegg, ið tekur støðu um býtið.

Stk. 3. Vøllirnir verða fyrst og fremst tillutaðir til fótbóltsvirksemi hjá fótbóltsfeløgunum, umframt at serlig atlit eru á Tórsvølli viðv. landsliðsvirksemi, bæði venjing og dystir, umframt luttøku hjá

fótbóltsfeløgunum í evropeiskum kappingum. Tøkar tíðir útyvir hetta kunnu verða lutaðar til annað fótbóltsvirksemi og í serligum førum onnur tiltøk, ið ikki fevnir um fótbólt.
Stk. 4. Tíðir, ið ikki eru í brúk, verða gjørdar tøkar á www.itrott.fo hjá øðrum at bíleggja.

**Skilhaldsreglur fyri brúk av vøllum og stadionøkjum**
§ 6. Ítróttaanlegg setur í gildi skilhaldsreglur o.l.
Stk. 2.
1. Royking er als ikki loyvd á fótbóltsvøllunum og í skýlum.
3. Ikki er loyvt at hava djór á fótbóltsvøllum og í skýlum, førarahundar tó undantiknir í skýlum.
4. Øll eiga at fara væl um bæði vøllir og anlegg annars.
5. Ikki er loyvt at kasta rusk o.l. frá sær. Ruskíløtini skulu nýtast.
6. Feløgini hava skyldu til at taka væl upp eftir sær eftir dyst.
7. Feløgini hava ábyrgd av at seta upp vallarfløgg og møgulig onnur fløgg.
8. Feløgini kunnu sbrt. avtalu við Ítróttaanlegg brúka møguligar speakaraboksir og máltalvur, herundir til lýsingar.
9. Ikki er loyvt at eta og drekka inni á vøllinum.
10. Ikki er loyvt at taka hvassar lutir inn á vøllin t.d. stólar.
Stk. 2. Venjarar og onnur kring feløgini hava skyldu til proaktivt at viðvirka til, at reglurnar verða hildnar.
Stk. 3. Allir brúkarar, tað veri seg feløg við limum ella teirra áskoðarar, skulu til eina og hvørja tíð rætta seg eftir ávísingum frá Ítróttaanleggum. Verða ávísingarnar ikki fylgdar, hevur Ítróttaanlegg rætt til uttan ávaring at nokta einstaklingum eins væl og feløgum atgongd til hølið ella anleggið.
Stk. 4. Søla kring vøllirnar er ikki loyvd uttan loyvi frammanundan frá Ítróttaanleggum.
Stk. 5. Skilhaldsreglur kunnu verða hongdar upp í ymisku hølunum og verða tillagaðar til hvørt høli.

**Kavi og serlig líkindir**
§ 7. Tá kavi er, roynir Ítróttaanlegg eftir umstøðunum at rudda vøllirnar. Feløg kunnu ikki rudda kava uttan loyvi frá Ítróttaanleggum.

**Útgerð**
§ 8. Øll útgerð, ið verður brúkt á vøllinum, skal lúka galdandi krøv til útgerð v.m. á graslíkisvøllum. Ikki er loyvt at brúka metalknubbar til fótbóltsstivlar.
Stk. 2. Málini skulu handfarast við skynsemi og skulu koyra á hjólunum. Ikki er loyvi at tveita hesi tvørtur um girðingina, men skulu tey setast á sítt ásetta pláss.

**Gjald fyri vallartíðir.**
§ 9. Gjald er ikki fyri vallartíðir.

**Lýsingar**
§ 10. Víst verður til galdandi leiðreglu um lýsingar kring fótbóltsvøllirnar.

**Skiftirúm v.m.**
§ 11. Feløgini hava sjálv ábyrgd av hesum hentleikum.

**Vallargóðkenningar**
§ 12. Fótbóltsfeløgini samskifta við FSF um góðkenning av vøllunum til kappingarnar, herundir viðv.

hentleikum til skifting v.m., umframt tað skipanarliga kring fyriskipan av dystum. Ítróttaanlegg samskiftir eisini við FSF um vallar- og stadionviðurskifti annars.

**Ljósskipanir**
§ 13. TK hevur ljósskipanir við allar vøllirnar. Feløgini, ið hava vallartímar við ávísu vøllirnar, fáa nærri tilskilað loyvi at brúka ljósskipanirnar, alt eftir tøkni o.ø. Feløgini leggja seg eftir at brúka ljós við størsta ansni og við minst møguligum ampa fyri nærumhvørvið. Hægsta styrki á Hoyvíksvølli og Tórsvølli kann einans nýtast til dystir í bestu deildunum hjá kvinnum og monnum.

**Endurgjaldsábyrgd**
§ 14. Brúkarar av vøllum og anleggum kunnu áleggjast endurgjaldsábyrgd í sambandi við misrøkt av vøllum, anleggum og útgerð. Herundir í sambandi við vantandi reinføri, og um tað ikki verður tikið upp eftir sær.

**Upplatingartíðir**
§ 15. Fyri ymisku vøllirnar verða nærri ásetingar gjørdar um, nær til ber at brúka vøllirnar og anleggið. Hetta sæst í bíleggingarskipanini.

**Avmarkingar**
§ 16. Brúkarar mugu tola, at tað kann koma fyri, at tillutaðar tíðir verða tiknar aftur í sambandi við ávísar kappingar o.a. Fráboðanir verða givnar so stundisliga sum gjørligt og vanliga minst 3 vikur frammanundan. Harumframt kann talan verða um, at tillutaðar tíðir verða tiknar aftur í sambandi við umvælingar og aðrar bráðfeingisstøður.
Stk. 2. Ikki er loyvt at framleiga tímar.

**Halgidagslóggávan**
§ 17. Ikki er loyvt at nýta vøllir í stríð við halgidagslógina halgidagar kl. 11 – 13, og ikki er loyvt at hava dystir, venjingar og tiltøk undir kirkjutíð á vøllunum.

**Avlýsing**
§ 18. Tey, sum hava fingið tillutaðar vallartíðir, eiga uttan drál at fara inn í skipanina og melda frá, um einstakar tíðir ikki verða brúktar ávísa ferð ella sum heild.

**Mishald og brot**
§ 19. Brot á hesar leiðreglur verða revsaðar soleiðis: fyrst fellur ein munnlig ávaring; síðan ein skrivlig ávaring; og um endurtikið verður, verða persónar, lið, møguliga felag burturvíst úr einari viku upp til fleiri mánaðir.

**Praktisk viðurskifti innan ítrótt**
§ 20. Ítróttafeløg, ið brúka vøllir, hava skyldu til:
At gera klárt til dystir og harvið at rudda av aftur. Áskoðarapláss skulu ruddast.

**Praktisk viðurskifti í sambandi við dystir**
§ 21.
1. Ábyrgdina av uppseting hevur felagið, við ávísing frá Ítróttaanleggum.
2. Vaktarfólk, atgongumerkjasølu, rudding og rættlag hevur felagið ábyrgdina av.
3. Øll hølir, ið brúkt eru undir tiltakinum, so sum áskoðarapláss og vesir, skulu ruddast, so klárt er hjá reingerðarfólki at vaska.
4. Felagið skal halda ásettu krøv frá brunaumsjónini hjá Tórshavnar kommunu.

**Atgongumerkjasøla**
§ 22. Felagið  skipar sjálvt fyri fólki til sølu av møguligum atgongumerkjum. Er neyðugt við politi-, bruna-, náttar-, ella aðrari vakt, syrgir felagið sjálvt fyri í samráð við Ítróttaanlegg, at slík vakt kemur, og ber útreiðslurnar, ið standast av hesum.

**Ábyrgd og trygging**
§ 23. Felagið/Brúkarin er endurgjaldsskyldugur fyri tað, ið av hansara ávum misferst í ella uttan um høllina eins og fyri skaða, ið hendir í leigutíðini.

**Gildiskoma**
§ 24. Hesar leiðreglur koma í gildi 6. juni 2019. Samstundis fara allar reglugerðir innan økið úr gildi.